## ÚT AT KOYRA

## BMW 320d



BMW 320d kemur nú við einum nýggjum common-rail dieselmotori við 150 hk, og koyrir 18,2 km pr. litur. Eisini hava framlyktirnar fingið nýtt design

*Kelda: FDM / Motor*

## CR-V frá Swindon



Ein nýggjur Honda CR-V verður á Tokio Motorshow í oktober. Ætlanin er at Honda verksmiðjan í Swindon í Onglandi, skal framleiða CR-V´ar til allan heimsmarknaðin

*Kelda: FDM / Motor*

## Accent nr. 1 og 2



Danska blaðið, Penge og Privatøkonomi, hevur kannað hvat tað kostar at halda bil í 3 ár og 45.000 km. Úrslitið varð at Hyundai Accent 1.3 LS bleiv nr. 1, og Accent 1.5 GS bleiv nr. 2 í sínum klassa

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

# Null-hugsjónin – mistøk ikki revsast við eini vanlukku

**Sambært Null-hugsjónini skulu teir álvarsligu ferðslutrupulleikarnir hvørva. Men hugsjónin kann tó - av góðum grundum - ikki gera, at vit sleppa undan øllum ólukkum**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Tilfarið um Null-hugsjónina, sum er grundað á drúgvar royndir og greinliga vitskapliga gransking, er sera rúgvusmikið. Hesaferð vísa vit innihaldið í Null-hugsjónini, sum er ein ítøkilig mynd av tí vegaferðslu, sum vit ynskja at fáa.

Null-hugsjónin er bygd á tann siðsemiliga grundvøllin, at tey mistøk, vit gera - og sum vit altíð fara at gera í ferðsluni - ikki skulu bera við sær, at nakar skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Ferðslukervið eigur at verða soleiðis skipað, at tey mistøk, vit gera, ikki skulu verða revsað við eini vanlukku.

*Brot úr fyrilestri hjá Petur J. Sigvardsen, starvsnevndarformanni í RFF*

**Vegurin til Null-hugsjónina - innihald**

- Null-hugsjónin
- Ferðslan og samfelagið
- Hvat er ein ferðslutrygdarábót?
- Ferð og trygd
- Rúsdrekka og ferðsla
- Tryggari ferðsluumhvørvi
- Børn í ferðsluni
- Gamlir bilførarar
- Tryggari bilar
- At siggjast í ferðsluni
- At nýta súkkluhjálm
- Bjarging, fyrstahjálp og endurbúgving
- Gera tey, sum eru í ferðsluni, eftir reglunum?
- Tú skalt vera eitt gott fyridømi

Null-hugsjónin

*Hetta er innihaldið í Null-hugsjónini - yvirskriftin yvir teir mongu smálutir, sum eiga at verða settir saman til eina heild*

# Bygnaðarbroytingar hjá Goodyear í Norðurlondum



*Sølustjórin hjá Goodyear í Danmark, Flemming Christensen, og marknaðarstjórin fyri Norðurlond og baltisku londini, Carl Ole Olofsen*

**Í sambandi við bygnaðarbroytingar hjá Goodyear í Norðurlondum, og at eitt nýtt vetrardekk, Ultra Grip 500, er komið á marknaðin, vóru sølustjórin í Danmark, Flemming Christensen, og sølu og marknaðarstjórin fyri Norðurlond og tey baltisku londini, Carl Ole Olofsen, á vitjan í Føroyum**

DEKK
*Magnus Gunnarsson*

Ein orsøk til at umboðsmennirnir hjá Goodyear heva verið her á vitjan, er at í løtuni eru stórar bygnaðarbroytingar í sambandi við marknaðarføring av Goodyear dekkum í Norðurlondum. Høvuðssætið fyri Norðurlond er í Stokholm í Svøríki. Dekkgoymslurnar eru lætnar upp, soleiðis at skilja, at um vit her í Føroyum hava brúk fyri einum dekki, sum ikki er á goymslu í Danmark, men í Norra, er tað ongin trupulleiki hjá okkum at fáa tað hendan vegin, líka skjótt sum úr Danmark.

### Færri restordrar

Nýggja skipanin fer at hava við sær, at færri dekk verða í restordra. Sum nú ein dagin tá ein gravimaskina, sum arbeiddi í undirsjóvartunnlinum, skuldi hava eitt dekk, sum ikki var á goymslu í Danmark, men í Svøríki. Dekkið var her eftir einari viku. Sølu og marknaðarstjórin, Carl Ole Olofsen, er javnan í Føroyum á vitjan, meðan sølustjórin, Flemming Christensen, hevur ikki verið her áður. Spurdur um munin á bilum og nýtsluni av dekkum í Danmark og Føroyum, heldur hann at vit í Føroyum brúka meira jeepar, og koyriumstøðurnar líkjast meira teimum í Norra og Svøríki.

### Ultra Grip 500

Goodyear umboðsmennirnir vístu eitt nýtt vetrardekk, Ultra Grip 500, sum er komið á marknaðin. Dekkið hevur tvey sløg av gummiblandingum í bananum, sum ger at dekkið broytist tá tað er slitið niður í helvt. So leingi dekkið er lógligt, virka lamellurnar, og koyrieginleikarnir í kava eru góðir. Um dekkið skal píkast, er tað av sera stórum týdningi at teir røttu píkarnir verða brúktir. Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk, sigur, at teir koma at hava nøkur sera góð tilboð av Goodyear dekkum til veturin.




*Vetrardekkið hjá Goodyear, Ultra Grip 500, er komið á marknaðin. Dekkið hevur 37 prosent meira lamellur enn Ultra Grip 400, sum tað avloysir*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**MAZDA 626 TDI TURBO DIESEL**
Árg 1999, Km 68.000. nýprísur kr. 230.000. Gev eitt rímuligt boð



**ELLISAFKFAR MERCEDES 220 BENSIN**
Árg 1971, Km 167.000.nýsýnaður, sera væl hildin, boð undir kr. 40.000 ongan áhuga



**DAEWOO NUBIRA CDX**
Árg 1998, Km 49.800. Til sølu við skaða, mista boð kr. 18.000

*tlf. 449613 - 217200*
*e-mail: jandan@post.olivant.fo*
*(best um kvøldið)*



**TOYOTA CARINA 2.0 GLI**
LV 123
Árg Mar-97, Km 70.000. Aut. gear. Kr. 132.000.



**CITROEN XANTIA 1,8I**
F 51 433
Árg Apr-95, Km 60.000. Kr. 95.000.



**VW GOLF 2,0**
GB 588
Árg 06/00, Km 17.000. Kr. 173.000.



**NISSAN MICRA**
GD 070
Árg Jan-99, Km 24.000. Aut gear. Kr. 108.000.



**AUDI A4 SEDAN**
BV 372
Árg Jul-96, Km 68.000. Kr. 159.000.

Audi SEAT

**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
**tel 315354 - www.audi-vw.net**



*Fyrsti Chrysler Grand Voyager við 3,3 litrum V6 motori kemur mánadagin. Frá Ivan Johansen Bilum verður sagt at áhugaði eru vælkomin at síggja bilin. Seinni kemur bilurin sum turbo diesel við "common-rail" innsprænging og 141 HK*

CITROËN
Ivan Johansen Bilar



**WV VENTO**
frá apríl. 92 í allarbesta standi til sølu. Bilurin er metalreyður og hevur eitt stórt viðførisrúm sum ALT passar í. Bilurin hevur koyrt 169.000 km og hevur ein 1900-cl diesel motor. Hann var keyptur úr Týsklandið fyri 4 árum síðani, og hevur verið á góðkendum verkstaði til øll ásett eftirlit, líka síðan hann var "føddur". (Eftirlitsbókin liggur í bilinum) Boð undir 70.000 kr ongan áhuga. Verður latin nýsýnaður.

*Ring á 312325*
*eftir kl. 20.00*



**VW PASSAT STV. 110HK**
Árg okt.98, "Bilurin er útgjørdur við m.a aut.gearum, el-rútum, el-sóltak, el-síðuspegl, sleipikrók og 17"" sportfelgur við 225x45 dekkum og heilársdekkum á felgum fylgja við. Telefon er í bilinum". Kr. 175.000.

*255716*

Sosialurin
Sosialurin
i



# JÓLA-BORÐHALD

Nú tað stundar til jóla, fáa allar fyritøkur, einstaklingar, feløg og eitt nú bindiklubbar høvi at bíleggja sær jólaborðið hjá okkum.

Pláss er fyri umleið 200 fólkum hvørt kvøldið. Er tað ein stór fyritøka, sum kundi hugsað sær at komið til okkara, kann hon fáa hølið einsamøll. Eru tit færri, verður sjálvandi borðreitt fyri tykkum saman.
Vilja tit hava tað meiri persónligt, ber til at fáa Kongasalin, ið tekur upp í 40 fólk. Velja tit Kongasalin, hava tit sjálvandi eisini atgongd til dansihølið.

Til dansin hesi kvøldini spæla nøkur av landsins bestu dansiorkestrum - **Ólavur Øster Band, Taxi, Jens Marni við manning** og onnur. Undirhald og felagssangur er sjálvandi, meðan tit sita til borðs.

Alt hetta er við í kostnaðinum, sum er **325 kr. fyri hvønn**. Harafturat er vælkomstdrykkur við í prísinum, umframt eitt atgongumerki til dansin, sum annars kostar 80 kr.

Bílegg pláss við at ringja á tel. 211 211

PLATFORM
discoteque
100 Tórshavn Tinghúsvegur 8 Tel.: 211 211